## Færri útlendskir ferðamenn

18.000 útlendsk ferðafólk ferðaðust um flogvøllin í Keflavík í Íslandi í februar, og tað var umleið 2.000 ella 10 prosent færri enn í sama mánaði í fjør. Tølini vísa, at síðani á nýggjárinum hava 40.000 útlendsk ferðafólk ferðast um Keflavíkar-flogvøllin, og tað er seks prosent færri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Harafturímóti er talið á íslendingum, sum fara av landinum loftvegis, minkað í stórum. Í februar vóru teir 15.000 í tali ímóti 32.000 í februar í 2008. Tað eru bara amerikanarar, sum eru fleiri í tali í ár enn í fjør, og av norðurlendingum eru tað bara danir, sum hava fingið betri hug at ferðast til Íslands.



## Óneyðug provokation frá løgmanni

**Vit kunnu ikki góðtaka, at løgmaður longu nú longu nú boðar frá, at onki er at koma eftir, næstu ferð, vit fara at samráðast um løn, sigur forkvinnan í Starvsmannafelagnum**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta er ein óneyðug provokatión frá løgmanni.

Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum, er ikki fegin um útsøgnina frá løgmanni í greinini omanfyri, har hann mest sum útihýsir lønarhækkingum, tá ið samráðingar verða aftur næsta ár.

Hetta er ikki ein góð byrjan upp á samráðingarnar, staðfestir hon

Hon vísir á, at samráðingarnar verða ikki fyrrenn um hálvtannað ár og tí skilir hon ikki, at Løgmaður longu nú kemur til eina so avgjørda niðurstøðu.

- Hvørki Kaj Leo Johannesen, Starvsmannafelagið ella nakar fíggjarfrøðingur, hava ánilsi fyri, hvussu fíggjarliga gongdin verður næsta ár, so tað er ótrúliga óheppið at koma við hesum nú, sigur Selma Ellingsgaard.

- Tað er undrunarvert, at løgmaður leggur samráðingarúrslitið fast hálvtannað ár áðrenn nakrar samráðingar eru byrjaðar og tað kunnu vit ikki góðtaka.

Hon sigur, at samráðingar eru millum tveir javntsettar partar og tí er hetta ein útsøgn, sum órógvar meiri enn gott er.

Áðrenn samráðingarnar hava verið, kann ongin siga nakað sum úrslitið sigur hon, og leggur afturat, at tey hava ikki enn gjørt upp um hvørji lønarkrøv møguliga koma upp á tal næsta ár.



*Almennu útreiðslurnar skulu ikki hækka, so skuldi tað hent, at sáttmálasamráðingarnar næsta heyst føra til lønarhækkingar, skulu tær takast inn aftur við sparingum, staðfestir Kaj Leo Johannesen, løgmaður, sum her situr umborð á Smyrli á veg til Havnar, eftir at landsstýrið helt fund í Suðuroy í allan gjár*

# Kunnu ikki droyma um lønarhækking næsta ár

**Næsta ár ganga sáttmálarnir hjá almennu fakfeløgunum út, men eg haldi ikki at nakar droymir um at lønirnar skulu hækka, sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður. Í øllum førum skulu allar lønarhækkingar takast inn aftur við sparingum, staðfestir hann**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður ikki ráð til at lata almennum starvsfólkið lønarhækkingar næsta ár.

Tað sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Landsstýrið hevur helt fund í Suðuroy í allan gjár og tá ið Sosialurin fekk orðið á løgmann umborð á Smyrli á veg norður til Havnar í morgun, staðfesti hann, at sum fíggjarliga støðan í samfelagnum er, mugu øll spenna beltið fastari um miðjuna, bæði tað almenna og vanligi føroyingurin.

Hann sigur, at landsstýrið er av álvara farið undir eitt arbeiðið, sum skal miðja eftir at fáa hallið á fíggjarlógini burtur upp á 3-5 ár.

Ein liður í arbeiðnum hjá landsstýrinum at fáa hallið á fíggjarlógin upp á 500 milliónir, burtur, er at avmarka almennu útreiðslurnar, har tað ber til, uttan at leggja samfelagið í dvala.

- Landið sleppur ikki undan at tálma útreiðslurnar, sigur Kaj Leo Johannesen

### Ongin útreiðsluhækking

Tann fyrsta oktober næsta ár ganga sáttmálarnir hjá almennu fakfeløgunum út, men løgmaður sigur, at sum støðan er nú, er tað ongin, sum setir nøsina upp eftir lønarhækkingum.

- Lønirnar eru hækkaðar nokk so fitt hesi seinastu árini og eg haldi ikki, at tað er nakar, sum droymir um, at lønirnar skulu hækka aftur næsta ár, sigur løgmaður.

Sostatt sigur hann, at tað er ikki væntandi, at lønarhækkingar hjá almennum starvsfólki næsta ár.

Kortini ásannar hann, at hetta er ein spurningur, sum fakfeløgini eru við til at gera av í samráðingunum við fíggjarmálaráðið.

Men í øllum førum staðfestir hann eisini, at almennu útreiðslurnar verða ikki hækkaðar næsta ár.

- Tað merkir, at skuldi tað hent, at onkrar lønir hækka, skulu hækkingarnar takast inn aftur við sparingum, tí útreiðslurnar hjá tí almenna skulu ikki hækka næsta ár.

- Tað verður heldur tvørtur ímóti sigur hann.

- Og tað er alt sum talar fyri, at støðan verður tann sama í 2011, leggur hann afturat.